## DAGSINS MEINING

# Heppið lutakast fyri allar Føroyar

Herfyri gjørdist greitt, hvørji lond Føroyar skulu spæla móti í EM-undankappingini í fótbólti, ið byrjar í heyst. Londini vit skulu spæla móti eru Ísland, Skotland, Litauen og Týskaland. Mong eru tey, ið eru fegin um, at Føroyar loksins sluppu at spæla móti eitt av teimum stóru fótbóltslondunum. At tað so skuldi gerast Týskland er ikki ringasta valið heldur. Og helst hevur hetta valið størri týdning enn flestu megu gera sær far um. Fyri landsliðskassan hevur hetta sjálvandi alstóran týdning. Fyri áhugan og spenningin hevur hetta týdning, men tað hevur so enn ein týdning, og tað er fyri føroysku ferðavinnuna og harvið eisini flutningsvinnuna.

Bólkurin vit eru komin í er sum skræddaraseymaður til rutuna hjá Norrønu. Trý av londunumliggja á ella beint við rutuna hjá Norrønu. Hetta gevur Smyril Line góðar møguleikar, ikki minst tá talan verður um at marknaðarføra nýggja skipið. At Týskaland er við átti so at kunnað kveikt nýtt lív í vónirnar at fáa týskarar at ferðast hendavegin. Tað er eisini greitt, at tá tað verður sett fokus á, at minsta tjóðin í Europa skal spæla móti tí størstu, David móti Goliat, so er hetta at meta sum ókeypis reklama í Týskalandi fyri Føroyum. Vit fara at fáa ótrúliga nógva og vónandi góða umtalu í týsku fjølmiðlunum, tí er tað nakað, sum rørir hjartastreingir, ið nemur til tjóðskaparkensluna hjá fólki, so er tað fótbóltslandsliðið. So tað er ikki ov nógv sagt, at kombinatiónin føroyska og týska fótbóltslandsliðið er at meta sum ein gullhøna fyri føroysku ferðavinnuna.

Tað er ikki so langt síðani, at nógv orka varð løgd í at fáa týsk ferðafólk til Føroya. Men markanaðarføring er ótrúliga dýr og so er spurningurin, hvat tú fær burtur úr, tá avtornar – er hon komin fram á rætta stað. Hetta nýtist tú als ikki at hugsa um, nú fótbóltslandsliðini gera alla marknaðarføringina fyri okkum. Skjótt fer hvør sál í Týskalandi at vita, hvar Føroyar liggja og hvat hetta okkara land hevur at bjóða teimum. So í veruleikanum átti fótbóltslandsliðið at staðið á eini serstakari konto á fíggjarlógini sum at: marknaðarføring av Føroyum.

Hetta hevur tí nógv at siga fyri bæði sjóvegis og ikki minst fyri loftvegis flutningin. Fyri Atlantsflog átti hetta at verið eitt upplagt høvi at marknaðarført bæði flogfelagið og landið. Felagið hevur jú samband við fleiri av londunum vit skulu kappast ímóti.

Vit mugu ikki lata okkum hetta frálíka høvi gleppa av hondum. Tí átti t.d. Ferðaráðið saman við øðrum impliseraðum at tikið stig til ein brainstormfund, har bert hetta eina málið varð á skránni: hvussu fáa vit brúkt føroysku luttøkuna í EM-kvalifiseringini í fótbólti til at marknaðarføra Føroyar og føroyska vørur. So einfalt er tað. So kemur restin av sær sjálvum. Vit hava longu fingið høvið forerandi. Vit kærdu okkara neyð, tá vit komu í bólk við lond sum Rusland. Nú vit hava fingið Týskaland áttu vit at sæð møguleikarnar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Onki ósatt

**Høgni Hoydal og Karsten Hansen**
*landsstýrismenn*





Formaður sambandsflokksins, Lisbeth L. Petersen, hevur lagt okkum undir at siga ósatt á tingsins røðarapalli. Hetta er grovt persónsálop og manipulasjón við sannleikanum. Tí heita vit nú sjálvir á landsstýrismálanevndina um at kanna málið til fulnar, so sannleikin kann koma fram.

Tá grundgevingarnar eru uppi, taka summir politikarar til lægstu vápn, ið hugsast kunnu: Persónsálopið – ella "karaktermorðið". Við ósannindum at sáa iva um trúvirðið hjá persónum við øðrvísi politiskari sannføring. Tað hevur myndað føroyskan politikk seinastu tíðina í ólukkumát.

Og tá fólk nú fara at leggja undirritaðu orð í munnin og síðani á skeivum grundarlagi at leggja okkum undir at siga ósatt – tá er nóg mikið.

Lisbeth L. Petersen leggur okkum undir at hava sagt, at danska staturin hevði "tjent sær eyka rentu" uppá lánini til Føroya undir kreppuni. Hetta er síðani endurtikið í fjølmiðlunum. Men hetta eru orðini hjá Lisbeth – ikki okkara.

Undir fíggjarlógarviðgerðini 9. okt. 2001, var eitt orðaskifti um, hvussu føroyingar hava vunnið sær burturúr kreppuni. Har førdu vit m.a. fram:

- At tað var vanligi føroyingurin, ið hevði goldið fyri alla føroysku kreppuna, og hevði omaná alt goldið rokningina hjá danska fíggjarheiminum við rentu av rentu. Sostatt var tað sjálvandi vanliga føroyinginum fyri at takka, at føroyska samfelagið nú er um at koma burturúr kreppuni.
- Hartil vísti Karsten Hansen á, hvat fór fram undir samráðingunum um loysn á bankamálinum – har rentan fyri lánina úr Danmark til Føroya var til samráðingar og ein ov høg renta boðin úr Danmark.

Hetta orðaskiftið fall Lisbeth L. Petersen fyri bróstið, og hon valdi at seta Ríkisumboðnum ein fyrispurning. Svarið hjá Ríkisumboðnum váttar júst tað, sum vit førdu fram: At danska stjórnin ikki misti pening ella lat nakað eyka til Føroya í kreppuni. Ein og hvør kann fara inn á heimasíðu Løgtingsins á www.logting.fo og hoyra við egnum oyrum, hvat sagt varð í tinginum. Vit hava eisini útskrivtir av orðaskiftinum, um nakar er áhugaður at kanna, hvat veruliga er sagt.

Kortini hevur Lisbeth L. Petersen lagt okkum undir at siga ósatt – og síðani er hetta endurtikið í fleiri fjølmiðlum. Tað undrar okkum tó, at slíkar skuldsetingar ikki fáa avleiðingar.

Til tess at fáa allan sannleikan fram í hesum máli, hava vit gjørt av at senda landsstýrismálanevndini hjá Løgtinginum eitt bræv. Har heita vit á nevndina um at kanna málið og gera sína niðurstøðu um, hvørt vit sum landsstýrismenn hava gjørt nakað skeivt í málinum.

# Norskur ummælari rakar plett

**Edmund Joensen**



**Í hesum døgum er tað gingið upp fyri flestu føroyingum, hvussu landsins leiðsla hevur vavt tað mesta í samfelagnum uppí ein ellubita. Heimastýrislógin er vend á høvdið fleiri ferðir. Í skrivandi løtu er hon tó aftur á fótum.o.s.f**

Tað er tí sera viðkomandi og læruríkt at vita, hvussu størstu karikaturteknarar og ummælarar síggja uppá okkarar fremstu leiðarar.

**Óli Petersen tann størsti.**
Norski journalisturin, Willy R.Kastborg, sigur í sínum ummæli um Óla Petersen m.a.: *"Hvor mange af Sosialurin lesere- eller for den sag skyld avisens egne medarbeidere- er klar over hans storhet? Hvor mange forstår at i dette lille, ensomme miljø finnes en kunstner som på sitt beste- og det er ofte- er på højde med det ypperste i nordisk tegnekunst.*

*Hva er det som skaper hans storhet?*
*Ikke bare at hans faste og krafftfulle strek er kararketerisk personlig. Ikke alene det at tegningene er rammende slagferdige. Hans storhed finnes i tegningenes indre substans.*

*De gjengir ikke bare uhyre presis den ytre likhet med personer og situasjoner. De utsier også treffende personers karakter. De avdekker deres indre personlighet, usynlig for vort øye. De forteller hvem de er, og hvordan de er."*

**Norski jurnalistur ummælir okkara stóra karikaturtegnara Òla Petersen í samband við at hann hevur teknað og givið út í bløðunum í mong Harran ár.**

Fyri at lýsa henda stóra føroya lands sonin Óla Petersen og hansara framúr evnir sum listamaður og politiskur eygleiðari, so tekur norski jurnalisturin millum annað eisini fram beinraknu dømini - kari-

*Framhald á næstu síðu*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 10*

katurtekningarnar av løgmanni og varaløgmanni.

Óli Petersen klárar við fáum strikum og fáum orðum, at lýsa teir báðar so væl, sum allir 32 tingmenn við fullari løn og pensión, og við allari sínari talutíð, í skrift og talu í fjølmiðlunum ikki klára.

Meistarin hevur langt síðan lisið av hesar báðar keisararnar í nýggjum klæðum. Hann letur teir spillnaknar á ein meistarliga beinraknan, elegantan og skemtiligan hátt.

**Varaløgmaður Høgni Hoydal gongur við skýklappum, vil ikki síggja verunleikan, men ger sær sín egna verunleika.**

Normaðurin sigur soleiðis m.a.:

*"Betrakt de to av hans yndligsobjekter, Anfinn Kalsberg og Høgni Hoydal, i forsidetegningen på skemt 99. Hoydals røde hue er trukket ned over øynene. Ansigtet er delvis skjult. Den ytre likhet observers øyeblikkelig. Den er av mindre betydning. Det er først og sist et skarpt sett portrett av et menneskes indre. Det viser en person som skyr virkeligheden. Som blindt lever i fiksjonen av en verden som ikke er. Et menniske som ikke vil og ikki kan se realiteterne í øynene. Som altid vil si: > Jeg har gjort opp min mening. Ikke forvirr meg med fakta,< I andre tegninger ser vi Hoydals ansigt. Det er ansigtet til den ensporede propagandist og ikke-polittiker".*

**Løgmaður bleytur sum voks hevur ikki eginleikar sum eykenna stórar leiðarar.**
**Normaðurin sigur um løgmann:**

***"Se så på samme tegning av Anfinn Kallsberg**. Et rundt, venligt og imødekommende menneske. En godviljens mann. Men portrettet har i sin altomfattende blidhed en farlig brodd. Mot en leder som alt for meget vil alle vel. Som mangler det nødvendige temprament til at slå i bordet. Til å regjere. En tiltalende godviljens mand, men ikke af det stoff betydelige ledere er gjort af."*

Kann tað lýsast og sigast betur og beinraknari. NEYVAN!

# Yvirtøkur og minni ríkisstuðul til frama fyri føroysk áhugamál

**- viðmerking til Kára Petersen**

**Kristina Háfoss**
*Búskapar- og løgfrøðingur*
*E-post: kristina@hafoss.com*
*Heimasíða: www.hafoss.com*
*Løgtingsvalevni*
*Tjóðveldisfloksins*



**Kári Petersen (KP) hevði grein í føroysku bløðunum mikudagin 13. februar har hann undir yvirskiftini: „Niðurskurður av blokkinum hevur skatt føroysk áhugamál", vil verða við, at niðurskurðurin av ríkisstuðulinum beinleiðis hevur skatt føroysk áhugamál – hetta verður sagt uttan at nevna við einum orði, at orsøkin til niðurskurðin eru yvirtøkur og harvið størri sjálvbjargni, sum í stóran mun er til frama fyri føroysk áhugamál.**

**Eg fari hervið at gera viðmerkingar til greinina hjá KP.**

**Hagtøl og stabbamyndir**
Tá ið tøl og myndir verða nýttar er lætt at geva fólki eina sannførandi uppfatan av einum vrangum veruleika.

KP vísir í tveimum stabbamyndum dømir um eina møguliga afturgjalding av uttanlandaskuld.

Fyrsta dømið vísir núverandi afturgjaldingarskipan har goldið verður 323 mió. kr. í rentum og avdrøgum um árið og harvið verður uttanlandaskuldin goldin ár 2018 – hetta er rætt.

Næsta dømið vísir, at varð ríkisstuðulin ikki minkaður (og harvið ongar yvirtøkur framdar) og peningurin í staðin varð nýttur til at gjalda meira tvs. 687 mió. kr. um árið í rentum og avdrøgum, kundi skuldin verið goldin ár 2008.

Sum hugmynd kann henda stabbamynd nýtast, men gevur henda eina skeiva mynd av veruleikanum.

Orsøkinar eru fleirfaldar:
- Ríkisstuðulin er longu skerdur við 364 mió. kr. frá 2002 at rokna.
- Føroyska uttanlandsskuldin er ikki ein trupulleiki fyri føroyska búkapin í dag. Um so var, kundi tann parturin av ogn landskassans í Landsbankanum, ið ikki er kravd uppsparing, verið nýtt til afturgjald av uttanlandaskuld, men so er ikki og er ein orsøk til hetta.
- Landsstýrið í dag eina sera góða avtalu viðvíkjandi afturgjaldinga av uttanlandaskuldini (323 mió. um árið til lága rentu (5%) yvir 20 ár) – so mikið góða, at møguligt avlop helst hevði kunna givið landskassanum betur avkast um hetta var nýtt til útlendskar íløgur heldur enn afturgjald av skuld.
- Rætt er, at hava ein ávísan likividitet til tess at hava frælsi at reka ein skilagóðan fíggjarpolitikk.
- Ongin niðurskurður í ríkisstuðulinum hevði borið við sær, at ongar yvirtøkur vóru framdar. Landsstýrið sett sær fyri at yvirtaka málsøki og fer hetta at bera í sær framhaldandi niðurskurð í ríkisstuðulinum.
- Hartil kemur at andstøðuflokkarnir lova stóran útreiðsluvøkstur sleppa teir framat landskassanum eftir løgtingsvalið.

Tað er tískil onki hald í, at nøkur samgonga vildi farið undir at goldið uttanlandsskuldina aftur skjótari enn hon longu verður goldin aftur í dag.

**Búskapurin er væl fyri**
Meðan metingar um framtíðina eru óvissar, eru hinvegin onnur tøl, ið kunnu staðfestast. Seinastu trý árini hevur avlopið á almennu fíggjarætlanini verið millum 500 og 600 milliónir krónur hvørt ár. Nú ríkisstuðulin fer at minka við 364 mió. krónum verður avlopið tað minni, tó vil fíggjarætlanin geva avlop. Hetta má sigast at verða tekin um ein búskap, ið er sera væl fyri. Tað er tískil burturvið tá ið talan ofta hevur verið um, at búskapurin er við at kollsigla v.m..

Sum er, eru játtaninar á nógvum samfelagsøkjum stórar og stórsti vandin í dag liggur í, at búskapurin kann verða yvirupphitaður – tískil eiga politikarar at varða sær, tá ið vallyfti verða givin.

Ongin ivi skal tó verða um, at nógv øki hava tørv á enn størri játtan v.m. – eitt nú eldraøkið – men ómøguligt er at seta øll segl til á øllum økjum í senn. Hetta vildi í stóran mun yvirupphitað føroyska búskapin. Tá ið tað er sagt skal eg viðmerkja, at eg tó ikki eri samd í øllum teimum raðfestingum, ið gjørdar eru einastu árini. Hetta er nakað, ið eg skal koma nærri inn á í komandi greinum.

**Barnafamiljur og eldraøkið**
Eg eri samd við KP í, at neyðugt er, at farið verður í holt við at fyrireika seg til framtíðar broytingina í fólkasamansetingini. Tað er ein stórur trupulleiki at metta talið av pensiónistum veksur við 30 % fram til 2017, meðan talið av teimum, ið arbeiðsføra aldrinum verður mett bert at vaksa við 5 % í sama tíðarskeiði.

Trupulleikin við framtíðar eftirlønarskipanini er tó nógv meira grundleggjandi trupulleiki enn at tosa um uttanlandaskuld. Neyðugt er fyri tað fyrsta, at nýggj eftirlønarskipan verður sett í verk, ið tryggjar, at øll á arbeiðsmarknaðinum gjalda í egna skipan, meðan landskassin síðan kemur at hefta fyri tey, ið ikki eru før fyri at gjalda í hesa skipan – hetta til tess at tryggja samhaldsfesti.

Somuleiðis má farast undir eina heildarætlan innan eldraøkið og eiga karmarnir hjá barnafamiljum at gerast nógv betur. Børnini eru framtíðin, og nú alsamt færri verða at gjalda fyri alsamt fleiri eldri er alneyðugt, at familjur verða stuðlaðar í at fáa børn – eitt nú við longri barsilstíð, betri barnagarðsmøgulleikum, størri barnafrádrátti o.s.fr.

**Politiskt og búskaparligt sjálvbjargni**
KP metur, at landsstýrið heldur enn at minkað ríkisstuðulin skuldið fingið avtalu við donsku stjórnina um at nýta 364 mió. kr. eyka um árið til at afturgjalda uttanlandaskuldina – hetta til tess, at sleppa av við skuldina skjótari og til tess at tryggja at komandi landsstýri ikki kunnu nýta henda pening til nýtslu.

Veruleikin er tó ein annar.

- Ein nýggj avtala við donsku stjórnina vildi als ikki tryggjað, at komandi landsstýri ikki fóru at nýta henda pening og harvið yvirupphita búskapin, tí henda avtala kundi verið broytt um hetta varð ynskt – **vil hetta tryggja búskaparligt sjálvbjargni ?**
- KP vísir á, at Javnaðarflokkurin ynskir at Føroyar skulu gerast fíggjarliga sjálvbjargnar. Men KP og øll onnur vita, at stóru andstøðuflokkarnir longu eru komnir við uppskotum til øktar útreiðslur – útreiðslur, ið ikki rúmast innan fyri núverandi karmar. Umboð fyri Javnaðarflokkin (sum KP stillar upp fyri til løgtingsvalið) hava enntá sagt, at neyðugt verður at fara niður til Danmarkar eftir hægri ríkisstuðuli um valskrá teirra skal hanga saman fíggjarliga. Skal ríkisstuðulin hækka er neyðugt, at vit lata málsøki, sum í dag eru føroysk aftur á danskar hendur – **er hetta til frama fyri politiskt, umsitingarligt og búskaparligt sjálvbjargni ?**
- Somuleiðis vildi ongin niðurskurður í ríkisstuðulinum borið við sær, at ongin yvirtøka varð framd – **er hetta til frama fyri føroysk áhugamál ?**
- Yvirtøkur, ið framdar eru /verða í 2002 eru: skúlamál, almenna forsorgin, Skipaeftirlitið, Vága Floghavn, útvarpsgrundaða neyð- og trygdartænastan og MRCC-støðin (kostnaður íalt 386 mió.). **Eru hesar yvirtøkur ikki til frama fyri politiskt og búskaparligt sjálvbjargni ?**
- Varðliga mett verða inntøkurnar hjá landskassanum komandi ár mettar at verða 3517 milliónir krónur. Vegna omanfyri standandi yvirtøkur verður danski ríkisstuðulin 642 milliónir krónur í 2002. Harvið fara inntøkurnar frá ríkisstuðulinum bert at verða 17 prosent av samlaðu inntøkum landskassans í 2002 mótvegis 26 prosent í 2001. **Er hetta ikki til frama fyri búskaparligt sjálvbjargni ?**

**Yvirtøkur og harvið minni ríkisstuðul – til frama fyri føroysk áhugamál**
Greitt er, at skulu málsøki yvirtakast og skulu føroyingar ráða yvir egnum landi, so fer danski statskassin ikki at gjalda fyri hetta. So hvørt sum føroyskir myndugleikar yvirtaka valdið á ymisku málsøkjunum, so hvørt gevast danskir myndugleikar at gjalda fyri hesi, og harvið minkar ríkisstuðulin.

Sum so ofta hevur verið víst á áður er best fyri ein hvønn búskap at gerast óheftur av stuðli og nú ríkisstuðulin bert er 17 % av inntøkum landskassans eru vit væl áleiðis at gerast búskaparliga sjálvbjargin.

Niðurskurðurin av ríkisstuðlinum skyldast yvirtøkur, ið flest allir føroyingar mugu verða glaðir fyri. Tá ið KP vil verða við, at ein skerjing av ríkisstuðulinum vegna yvirtøkur hevur skatt føroysk áhugamál, hevur hann so sanniliga eina heilt øðrvísi fatan av, hvørji føroysk áhugamál eru, enn flestu føroyingar hava.

Yvirtøkur - og harvið minni ríkisstuðul - fremja politiskt, umsitingarligt og búskaparligt sjálvbjargni og eru soleiðis til frama fyri føroysk áhugamál.


